# ítróttur

Nr. 15 • hósdagur • 23. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


## Væleydnað rútmisk kapping

**Havnar Fimleikafelag hevði sunnudagin kapping í rútmiskum fimleiki**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*



Seinasta sunnudag skipaði Havnar Fimleikafelag fyri innanhýsis rútmiskari kapping í høllini á Stórheyggi. Til samans høvdu 11 lið við 4-6 fimleikarum á hvørjum liði teknað seg til kappingina, og hetta er met, verður sagt í tíðindaskrivi frá Havnar Fimleikafelag.

Sum heild eydnaðist kappingin sera væl. Eitt var, at talið av íðkarum var óvæntað høgt, men eisini talið á áskoðarum var nakað væl størri enn tað, sum roknað varð við.

Um sjálva kappingina er annars at siga, at hetta var ein av tí meira fría slagnum. Luttakaranir gjørdu sjálvi av, hvussu serian hjá teimum skuldi koyrast, og tó at stigini hjá ymsu liðunum ikki vórðu upplýst, so fór dømingin fram á sama hátt, sum hon ger til eitt nú rútmisku stórkappingarnar.

Tey trý fremstu liðini í hvørjum aldursbólki fingu heiðursmerki handaði, og vórðu úrslitini hesi:

### Bólkur 1: 3.-4. flokkur

**1 Flákrandi flykran**
Rannvá G. Niclasen, Tordis Magnusen, Eydna Danielsen og Unn Borgardóttir
**2 Girls**
Elisabeth I. Jacobsen, Rakul Jansdóttir, Brynhild D. Carlsson og Birgir Jacobsen
**3 Hip Hop Diddurnar**
Anna Kristina Thomsen, Annika Lervig, Linda Olsen og Bryndis í Dali

### Bókur 2: 5.-6. flokkur

**1 Number 1**
Jónvá Ellingsgaard, Vár K. Poulsen, Ann-Mari Sigurheim og Karina Vegerberg
**2 Stella Nova**
Anja Eliasen, Beinda D. Joensen, Christa R. Weihe, Anna Mari Nielsen, Billa M. Sandoy og Bára B. Danielsen
**3 Colores**
Fríða Andreasen, Bára Simonsen, Bára Haraldsen og Joan Samuelsen

### Bólkur 3: 7. flokkur og eldri

**1 Puffy**
Barba Jansdóttir, Marta N. Hansen, Ingibjørg M. Arnadóttir, Ester Vang, Birita Dal-Christiansen og Bára B. Danielsen
**2 Aurora**
Elisabeth Knudsen, Turið Poulsen, Rannvá K. Abrahamsen og Maria Poulsen
**3 Hot Shot**
Daisy E. Saxov, Vilhelmina Olsen, Barbara B. Vilhelmsen og Rannvá Nónfjall

*Hjá teimum elstu vann Puffy, sum hevði ikki færri enn seks fimleikarar á sínum liði*



*Í kappingini fyri tey í 5. og 6. flokki vunnu Number 1*



*Kappingina fyri yngsta bólkin vunnu tær fýra, sum róptu seg Flákrandi flykran*

## B68 málverjin komin upp á pláss

**Tað verður íslendski Albert Sævarsson, sum komandi árið skal verja málið hjá B68**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at tað gjørdist greitt, at Michael Kokoszanek ikki skuldi verja B68 málið komandi kappingarár, hevur felagið í fleiri umførum verið sett í samband við ymsar málverjar. Eftir at fleiri royndir higartil eru miseydnaðar, hevur B68 umvegis heimasíðu felagsins nú upplýst, at tað verður ein íslendingur, sum fer at verja málið hjá besta liði felagsins.

Talan er um 29 ára gamla Albert Sævarsson, sum fram til hetta hevur vart málið hjá Grindavík í bestu íslendsku deildini.

Heilt uttan føroyskt ískoyti er nýggi málverjin tó ikki. Hann er giftur føroyskari konu, og fyri einum fýra árum síðani varð hann eisini settur í samband við B36, men ta ferðina varð hetta av ongum.

Sambært upplýsingum á heimasíðuni hjá Grindavík, hevur Albert leikt 133 dystir fyri besta liðið har, so talan er á ongan hátt um nakran óroyndan leikara, sum toftamenn nú hava ognað sær.



## Eitt sindur av ólagi

**Fyri tað mesta hevur gingið eftir bókini, men talan hevur so sanniliga eisini verið um størri og minni sensatiónir, nú tey bæði fyrstu leikumførini í HM-kappingini í hondbólti eru farin aftur um bak**

HM-HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hondbóltshugaðir føroyingar sita í hesum døgum ivaleyst klíndir at skíggjanum, tá hópatals hondbóltsdystir í altjóða flokki verða varpaðir úr Portugal, har HM-kappingin fyri manslandslið verður leikt í løtuni.

Sjálvsagt ber ikki til at gera nakra niðurstøðu eftir teimum báðum fyrstu umførunum, men hinvegin er einki at taka seg aftur í, at nøkur óvæntað úrslit hava verið at sæð.



*Roknast kann ikki vi?, at Grønland fer at gera tær stóru skreytirnar undir HM, men eitt nú hevur Jacob Larsen veruliga markera? seg. Hann er higartil toppskjútti í bólki B*

### Sólin skínur á Argentina

Ikki minst er tað óvæntað, at Argentina í bólki C hevur staðiði seg somikið væl, sum teir tykjast at gera. Suðuramerikansku londini verða vanliga ikki roknað fyri tað heilt stóra í hondbóltshøpi, og ivaleyst høvdu tey flestu roknað við, at hesi lond fingu eina skjóta retur-billet úr kappingini, men enn hevur Argentina so noktað at geva skarvin yvir.

Fyrst vunnu teir rættiliga óvæntað á Kroatia við einum einstøkum máli, og mikudagin stóðu teir so fyri enn einum óvæntaðum úrsliti. Móti russisku bjørnini eydnaðist nevnliga at fáa javnleik.

Eisini hevur Slovenia í Bólki D sýnt seg frá síni bestu síðu í innleiðandi dystunum. Fyrsta dystin vóru teir greitt við undirlutan móti dønum, men tá teir í næsta dystinum hittu Svøríki, bragdaði. Talan gjørdist um greiðan 29-25 sigur til slovenar, og hetta mundi í øllum førum vera nakað, sum sendi sjokkbylgjur gjøgnum sigursvanda hondbólts-Svøríki, meðan slovenar hinvegin høvdu alla orsøk at fagnast.

Í hinum báðum bólkunum hava úrslitini verið eitt sindur meira eftir bókini. Kanska einamest í Bólki B, har Grønland og serstakliga Australia mugu metast sum nøkur av veikastu londunum í kappingini.

### Misjøvn norðanlond

Úr einum norðurlendskum sjónarhornið er sjálvandi áhugavert at staðfesta, at ikki færri enn fýra av grannalondum okkara eru umboðað í kappingini.

Sum nevnt verður Grønland mett millum veikastu liðini í kappingini, og tað er illa hugsandi, at teir megna at gera nakrar skreytir í samlaðu støðuni. Tó man tað vera ein persónligur sigur hjá Jacob Larsen, at hann eftir tey bæði fyrstu umførini er skrásettur sum toppskjútti í sínum bólki.

Ísland er í sama bólki sum Grønland, og hjá teimum hevur gingið sum eftir ánni hesar fyrstu dystirnar. Enn resta tó dystir móti teimum sterku londunum í bólkinum, og ikki minst verður spennandi at síggja, hvussu dysturin móti Týsklandi fer at spæla av.

Svøríki og Danmark eru bæði í bólki D, og her hevur verið heldur misjavnt, hvussu tey hava staðið seg. Fyrra umfarið var ikki stórvegis roks frá teirra síðu, men mikudagin stóð verri til.

Danir kunnu bert takka veiku mótstøðuni úr Brasil fyri, at teir fingu tvey stig burtur úr einum av lagi vánaligum degi, men sviar sluppu hinvegin ikki eins lætt, tá teir hittu Slovenia.

Bæði Danmark og Svøríki verða annars mett millum londini, sum kunnu ota seg heilt fram í oddin, tá avtornar, men fyri fyrst má bara staðfestast, at skal hetta gerast veruleiki, so er neyðugt, at spælið verður nógv meira støðufast, enn liðini higartil hava sýnt.

Mangir eru tó leikir í longum talvi, og einki er at ivast í, at liðini eisini koma at hava sínar ljósu løtur, og so er bara at vóna, at hesar verða funnar í røttu løtunum.

## Stjørnan og VÍF í kvøld

Ein hálvfinala í Coca-Cola kappingini fyri kvinnur verður leikt í Klaksvík hóskvøldið, tá Stjørnan og VÍF fara at avgreiða fyrra dystin sínamillum.

Lítið er at ivast í, at VÍF eru favorittar at vinna dystin, men hinvegin sýndu strandakvinnur fyri hálvara viku síðani, at VÍF ikki er púrasta einaráðandi. Skal Stjørnan gera nakað við VÍF samanlagt, verður í øllum førum neyðugt við einum heilt góðum avrikið í kvøld, soleiðis at tær hava nakað at geva av, tá seinna hálvfinalan skal leikast í Vestmanna.

**-jm**

## HM-úrslit:

Bólkur A

| | |
|---|---|
| Kuwait-Jugoslavia | 14-36 |
| Poland-Spania | 25-34 |
| Marokko-Tunis | 24-28 |
| Tunis-Kuwait | 29-20 |
| Spania-Marokko | 23-18 |
| Jugoslavia-Poland | 24-20 |

Bólkur B

| | |
|---|---|
| Qatar-Portugal | 21-31 |
| Australia-Týskland | 16-46 |
| Grønland-Ísland | 17-30 |
| Týskland-Qatar | 17-30 |
| Ísland-Australia | 55-15 |
| Portugal-Grønland | 34-19 |

Bólkur C

| | |
|---|---|
| Saudi Arabia-Kroatia | 22-25 |
| Ungarn-Frakland | 24-29 |
| Argentina-Russland | 26-26 |
| Frakland-Saudi Arabia | 30-23 |
| Russland-Ungarn | 31-30 |
| Kroatia-Argentina | 29-30 |

Bólkur D

| | |
|---|---|
| Egyptaland-Algir | 25-25 |
| Slovenia-Svøríki | 29-25 |
| Brasilia-Danmark | 24-28 |
| Svøríki-Egyptaland | 29-23 |
| Algir-Brasilia | 22-22 |
| Danmark-Slovenia | 33-24 |

## HM-hondbóltur

Bólkur A

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jugoslavia | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 60 | 34 | 26 | 4 |
| 2 Spania | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 57 | 43 | 14 | 4 |
| 3 Tunis | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 57 | 44 | 13 | 4 |
| 4 Marokko | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 42 | 51 | -9 | 0 |
| 5 Poland | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 45 | 58 | -13 | 0 |
| 6 Kuwait | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 34 | 65 | -31 | 0 |

Bólkur B

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Týskland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 86 | 33 | 53 | 4 |
| 2 Ísland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 85 | 32 | 53 | 4 |
| 3 Portugal | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 65 | 40 | 25 | 4 |
| 4 Grønland | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 36 | 64 | -28 | 0 |
| 5 Qatar | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 38 | 71 | -33 | 0 |
| 6 Australia | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 31 | 101 | -70 | 0 |

Bólkur C

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 59 | 47 | 12 | 4 |
| 2 Russland | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 57 | 56 | 1 | 3 |
| 3 Argentina | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 56 | 55 | 1 | 3 |
| 4 Kroatia | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 54 | 52 | 2 | 2 |
| 5 Ungarn | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 54 | 60 | -6 | 0 |
| 6 Saudi Arabia | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 45 | 55 | -10 | 0 |

Bólkur D

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Danmark | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 61 | 48 | 13 | 4 |
| 2 Svøríki | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 54 | 52 | 2 | 2 |
| 3 Algir | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 47 | 47 | 0 | 2 |
| 4 Slovenia | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 53 | 58 | -5 | 2 |
| 5 Brasilia | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 46 | 50 | -4 | 1 |
| 6 Egyptaland | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 48 | 54 | -6 | 1 |